FISKIMÁLARÁÐIÐ

P/F Kinnfelli
á Heimaru Bryggju 6
370 Miðvágur

**Stjórnarskrivstovan**
22. november 2018
Mál: 18/00254-27
(at tilskila í svari)

Viðgjort: RR/TVR

Tygara skriv:

## Avgerð Fiskimálaráðsins viðv. umsókn um broytingar í tilsøgnini at fiska menningarkvotu í 2018

Klientur tygara fekk tann 13. aug. 2018 tillutað eina menningarkvotu áljóðandi 10.400 tons av svartkjafti fyri 2018, sum við ískoytisskrivi, dagfest 12. sept. 2018, bleiv hækkað til 13.000 tons. Klientur tygara fekk sama dag tillutað eina menningarkvotu áljóðandi 2.224 tons av makreli ávikavist 1.770 tons av sild. Sum tygum nokk longu vita, fekk klientur tygara tillutað menningarkvotu fyri árini 2019, 2020 og 2021 áljóðandi 13.000 tons av svartkjafti, 1.900 tons av makreli og 1.770 tons av sild tey nevndu árini.

Í skrivi til Fiskimálaráðið, dagfest 2. nov. 2018, soktu tygum vegna P/F Skip (undir stovnan) um at flyta ein part av tillutaðu kvotunum til komandi ár, tí útlit ikki eru til, at menningarkvoturnar fyri 2018 kunnu fiskast í ár. Í avgerð, dagfest 13. nov. 2018, metti Fiskimálaráðið ikki, at heimild var at flyta menningarkvotur millum ár, og Fiskimálaráðið metti heldur ikki, at umstøðurnar hjá klienti tygara eru so mikið serligar, at tær minna um neyðrættarumstøður. Tískil gekk Fiskimálaráðið ikki umsóknini á móti. Dagin eftir, tann 14. nov. 2018, sendu tygum vegna klient tygara umsókn til Fiskimálaráðið, har víst var á tilsøgn frá Fiskimálaráðnum, dagfest 12. august 2018, og ískoyti til tilsøgnina, dagfest 12. september 2018, har verklætlan hjá P/f Skip (undir stovnan), nú P/f Kinnfelli undir stovnan, fær tillutað menningarkvotu eftir nærri ásettum treytum. Í umsóknini verður upplýst, at felagið í allarnærmastu framtíð fær leverað skipið Katrin Johanna VA 410 við kallinummari XPWC til at fiska ta kvotu, sum felagnum er tillutað. Skipið væntaðist tann 14. nov. 2018 leverað felagnum um eina góða viku.

Skrivað stendur, at so skjótt sum Katrin Johanna VA 410 er leverað og klár, verður farið til fiskiskap at troyta tillutaðu nøgdina fyri 2018. Ætlanin er, øll sum hon er, grundað á, at fiskaðu nøgdirnar skulu leverast til og virkast á Snarfrost í Miðvági, og hetta er eisini avgjørda fyritreytin fyri allari verkætlanini og umsóknini um menningarkvotu, stendur í umsóknini frá 14. nov. 2018. Felagið væntar og vónar, at verkætlanin verður grundarlagið undir menning og nýskapandi virksemi í Vágoynni.

Víst verður á at arbeitt hevur verið við verkætlanini í langa tíð og síðani felagum varð tillutað menningarkvotu, er ferð av álvara sett á ítøkiligu fyrireikingarnar, herundir eisini út- og umbyggingar av virkinum Snarfrost.

Tygum føra fram vegna klient tygara, at so hvørt sum Snarfrost verður útbygt til at taka ímóti nøgdunum verður øll veiðan samsvarandi umsókn felagsins og tilsøgn Fiskimálaráðsins leverað til og virkað á Snarfrost í Miðvági. Orsakað av at tað er so langt liðið út á árið, fer ikki at bera til hjá Snarfrost at taka ímóti øllum teimum nøgdum, sum ætlandi verða fiskaðar í ár, stendur skrivað í umsóknini, dagfest 14. nov. 2018. Afturat hesum fer Katrin Jóhanna VA 410 ikki at megna at fiska alla tillutaðu

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

kvotuna í ár.

Skrivað stendur eisini í umsóknini, at sum nú er, er virkið klárt at taka ímóti sild og makreli og størst møguligar nøgdir av hesum fiskaslagi verða tí leveraðar til og virkaðar á Snarfrost í ár. Snarfrost klárar, sum nú er, at taka ímóti og virka 50 tons um samdøgrið. Kapasiteturin hjá Snarfrost verður útbygdur, og virkið væntast at kunna taka ímóti og virka 150 tons um samdøgrið, tá liðið er út á várið 2019. Arbeitt verður við eisini at gera virkið klárt at taka ímóti svartkjafti, og væntandi kann virkið longu í komandi ári taka ímóti einum parti av svartkjaftinum. Ætlanin er at víðarivirka svartkjaftin til matna.

Snarfrost megnar sum nevnt ikki at taka ímóti øllum teimum nøgdum, sum ætlandi verða fiskaðar í ár.

Tí er neyðugt hjá felagnum at søkja Fiskimálaráðið um loyvi til í inniverandi ári at landa nakað av veiðuni aðrastaðni í Føroyum, ið Snarfrost ikki í ár fer at hava møguleika at taka ímóti og virka.

Felagið ynskir í mest møguligan mun at landa veiðuna til virki, sum liggja á økjum, ið hava fingið tillutað menningarkvotu. Felagið hevur verið í sambandi við virkið hjá P/f Vestmanna Seafood í Vestmanna og P/f TG Seafood í Hvalba. Hesi virki kunnu taka ímóti pørtum av tí veiðu, sum verður løgd upp í ár. Søkt verður um loyvi til at landa partar av veiðuni, ið Snarfrost ikki fær tikið ímóti, til hesi virki í tann mun, at hesi virki bjóða marknaðarprís fyri veiðuna.

Í tann mun at tað ikki ber til hjá P/f Vestmanna Seafood og P/f TG Seafood at taka ímóti teimum nøgdum, sum Katrin Jóhanna VA 410 fer at veiða, verður søkt um loyvi til at landa hendan partin av veiðuni til onnur virki í Føroyum.

Viðvíkjandi svartkjafti eru fá virki, sum nú eru før fyri at taka ímóti stórum nøgdum av svartkjafti. Tí verður søkt um loyvi til at landa tann svartkjaft, sum verður fiskaður í ár, til virki, sum ikki liggja á økjum, sum hava fingið tillutað menningarkvotu. Virkini, sum talan kann verða um at landa svartkjaftin til, eru Havsbrún, Pelagos, Faroe Pelagic og Varðin Pelagic.

<u>Lýsing:</u>
Sambært § 60, stk. 1, 1. pkt. í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi er ásett, at ein partur av tøkari føroyskari kvotu kann verða settur av til at brúka sum lið í vinnuligum menningarætlanum kring landið. Sambært § 60, stk. 2 í somu lóg stendur, at menningarkvota kann latast til menningarætlanir, sum kunnu stuðla undir virðisøking av sjófeingi í ávísum øki í landinum, har atgongd til sjófeingi er avmarkað, ella arbeiðsloysið er stórt, samanborið við onnur øki í landinum, ella øki við støðugt minkandi fólkatali.

Endamálið við ásetingini er at stuðla undir vinnuligum virksemi og virðisøking burtur úr tí tilfeingi, sum er ogn Føroya fólks, og at ein ávís atkomuligheit eisini má tryggjast kring landið. Yvirskipaða treytin fyri at fáa lut í menningarkvotu er, at talan er um øki í landinum, har atgongdin til sjófeingi er avmarkað, ella arbeiðsloysið er stórt sammett við onnur øki í landinum, ella øki við støðugt minkandi fólkatali. Grundleggjandi treyt er eisini, at talan skal vera um ætlanir, ið stuðla undir vinnumenning og virðisøking av sjófeingi í viðkomandi øki í landinum, sbr. løgtingsmál 18/2017, bls. 122.

Sum alment sakligt atlit er atlitið til at sleppa undan, at virðið fara fyri skeyti (værdispildshensyn), eins og atlit má takast til møguligt góðvarni hjá borgara (berettigede forventninger).

<u>Meting:</u>
Í tilsøgnini, dagfest 13. aug. 2018, ið var latin P/F Skip (undir stovnan), sum nú eitur P/F Kinnfelli, var ásett, at tillutaða kvotan skal gagnnýtast innan fyri verkætlanina. Í tann mun kvotan ikki kann

gagnnýtast innan fyri verkætlanina, skuldi P/F Skip (undir stovnan) boða Fiskimálaráðnum frá hesum innan 3. september 2018. Hóast hesa tíðarfreist hava tygum vegna P/F Kinnfelli boðað Fiskimálaráðnum frá, at kvotan ikki fult og heilt kann gagnnýtast innan fyri verkætlanina, sbr. umsókn tygara vegna P/F Kinnfelli, dagfest 14. nov. 2018. Fiskimálaráðið tilskilaði sær rættin í upprunaligu tilsognini at taka tann partin av kvotuni aftur, sum ikki kundi gagnnýtast innan verkætlanina. Í mun til endamálið við menningarkvotunum metti Metingarnevndin, at verkætlanin hjá P/F Skip (undir stovnan) er nýskapandi við hovuðsdenti á góðsku og nýggjar marknaðir, og fer at geva munandi virðisøking.

Verkætlanin var eisini mett at geva økta førleikamenning og fleiri og støðugari arbeiðspláss í økinum (heilársbeiði). Nevndin vísti á, at staðsetingin er í einum øki, har rættuliga avmarkað atgongd er til sjófeingi t.e. í Vágum, sbr. umsókn frá P/F Skip (undir stovnan), dagfest 28. mai 2018.

<u>Avgerð og treytir:</u>
Vísandi til omanfyri standandi fer Fiskimálaráðið hervið at ganga umsókn tygara vegna P/F Kinnfelli á móti við teirri grundleggjandi økisrættarligu fyritreyt, at tillutaða kvotan skal gagnnýtast innan fyri verkætlanina t.e., at veiðan í mestan mun verður landað og virkað á virkinum í Miðvági, Snarfrost. Sum upplýst verður í umsóknini, er virkið í Miðvági klárt at taka ímóti sild og makreli, og tí vera størst møguligar nøgdir av hesum fiskaslagi leveraðar til og virkaðar á Snarfrost í ár, og sostatt verður sett sum treyt, at mest møguligt av sild og makrel verður gagnnýtt á nevnda virki. Upplýst verður harumframt í umsóknini, at virkið í Miðvági klárar, sum nú er, at taka ímóti og virka 50 tons um samdøgrið. Kapasiteturin hjá Snarfrost verður sambært umsóknini útbygdur, og virkið væntast at kunna taka ímóti og virka 150 tons um samdøgrið, tá liðið er út á várið 2019.

Sum onnur treyt verður sett, at tann parturin av sild og makrel, ið ikki kann leverast og virkast í Miðvági skal fara til onnur menningarøki í landinum uttan mun til prís, tí atlitið til at menna ávís øki í landinum samsvarandi endamálinum við skipanini við menningarkvotum verður raðfest munandi hægri enn fíggjarlig áhugamál hjá einstaklingum, sum hava fingið tillutað menningarkvotur við teirri grundleggjandi fyritreyt, at ávís øki í landinum verða ment. Í hesum sambandi verður serliga hugsað um Vestmanna, sum liggur í nærhendis Vágunum og síðani Hvalba, soleiðis sum tit hava søkt um tann 14. nov. 2018.

Viðvíkjandi svartkjaftinum skal sagt vera frá, at møgdin av svartkjafti er rættiliga stór í mun til, hvussu nógv kann gagnnýtast í inniverandi ári av hesi kvotu, og tískil verður hervið loyvt, at svartkjafturin kann landast til onnur øki í landinum í tann mun, at tað ikki letur seg gera at gagnnýta svartkjaftin í einum menningarøki. Hetta er grundað á atlitið til at sleppa undan, at virðið fara fyri skeyti vegna møguliga ov lítla móttøkuorku á virkjum í økjum, sum vera mett sum menningarøki. Harumframt hava onnur fingið líknandi loyvi til at landa svartkjaft í 2018 í øðrum økjum, har tað ikki letur seg gera at landa í menningarøkjum til tess at tryggja raksturin ta fyrstu tíðina.

**Vísandi til omanfyri standandi økisrættarligu fyritreytir verður tilsøgnin hervið broytt samsvarandi.**

Aðrar broytingar skulu góðkennast av Fiskimálaráðnum, áðrenn teir vera framdar í verki, og Fiskimálaráðið tilskilar sær rættin at taka tillutaða menningarkvotu aftur, um rættindahavari ikki gagnnýtir menningarkvotuna innan fyri verkætlanina við eitt nú ikki at lúka økisrættarligu fyritreytirnar. Víst verður eisini til § 4, stk. 4 í kunngerð um menningarkvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til menningarætlanir í ávísum øki í 2018, ið ásetir, at landsstýrismaðurin kann nokta at endurnýggja ella

lutvíst endurnýggja menningarkvotu, um avgerandi treytir fyri játtanini til menningarkvotu sambært menningarætlanini ikki eru hildnar.

Áðrenn nakað fiskiloyvi kann útskrivast skal mogulig kanning gerast av ognarviðurskiftum sambært § 3 í kunngerðini um menningarkvotur, ið er delegerað til Vorn at umsita, sbr. § 5, stk. 1 og §§ 6, 7 og 9 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Í hesum sambandi skal Vorn eisini eftirkanna, hvørt persónarnir handan P/F Kinnfelli eru teir somu sum persónarnir handan P/F Skip (undir stovnan), sum av fyrstan tíð søktu og fingu tillutað menningarkvotu.

**Henda broytta tilsøgn er galdandi til og við 31. des. 2018.** Eftir hetta stendur upprunaliga tilsøgnin, dagfest 13. aug. 2018 við ískoyti frá 12. sept. 2018 við.

Henda avgerð er endalig innan fyrisitingina, og Fiskimálaráðið ger fyribils ikki meiri við málið.

Avrit av hesi avgerð verður send Vorn til kunningar.

Blíðar heilsur

Rógvi Reinert
Aðalstjóri